# Spenningurin í hæddini



Strandingar vunnu seinasta dystin á VÍF, og ognaðu sær harvið meistaraheitið fyri fimtu ferð í søgu felagsins

Mynd: Álvur Haraldsen

**Einki var avgjørt fyrr enn í seinasta umfarinum, og bara tað í sjálvum sær er nóg mikið til at staðfesta, at talan var um eitt sera stuttligt kappingarár**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Júst lidna kappingarárið gjørdist eitt tað mest spennandi í føroyskum manshondbólti í langa tíð. Alla tíðina vóru tað StÍF og VÍF, sum stríddust í oddinum, men Neistin var væl við í grundspælinum, meðan teir í Kyndli helst iðra seg um, at teir ikki komu í gongd eitt lítið vet fyrr.

Allar spekulatiónir í so máta kunnu tó vera tað sama, nú árið er liðugt. StÍF vann meistaraheitið, og tykist vera væl ávegis til at vinna sær eina støðu sum ein álvarsligur maktfaktorur í føroyskum hondbólti. Vestmenningar duttu í seinastu løtu niður á bronsuplássið, men vilja ivaleyst gera tað betri næsta ár. Og við einum fantastiskum endaspurti fekk Kyndil ognað sær silvurmerkini.

Niðanfyri verður í stuttum tikið saman um, hvussu kappingarárið hjá einstøku liðunum hilnaðist.

### 1 – StÍF

Strandingar gjørdust føroyameistarar, og lat tað beinan vegin verða sagt, at hetta var fult uppiborið. Teir snávaðu nakrar ferðir á vegnum, men mest sum hvørja ferð teir veruliga høvdu tørv á stigunum, reistust teir sum lið.

Vørumerkið hjá liðnum er framvegis kvika álopsspælið, har teir tríggir bakspælararnir alla tíðina hótta, men eisini verjuparturin er ein týðandi liður í spælinum. Og so hevur liðið fyri tað mesta eisini havt tað hepnið, sum altíð er neyðugt, um steyp skulu vinnast. Mest sum hvørja ferð at dystirnir hava verið á vippuni, hava strandingarnir megnað at fingið stig burturúr. Ein dygd, sum altíð er við einum meistaraliði.

### 2 – Kyndil

Við einum longum endaspurti upp á átta sigrar á rað eydnaðist Kyndli at vinna seg framum arvafíggindarnar og upp á bronsumerkið. Saman við sigrinum í steypafinaluni merkir hetta, at árið hjá Kyndli varð hitt besta síðani FM-gullið í 1996.

Tað man tó vera lítið at ivast í, at tey í Kyndli iðra seg um, at liðið ikki fekk ferð á nakað fyrr. Hevði úrtøkan í grundspælinum verið bara nær námind henni í endaspælinum, kundi í øllum førum væl verið, at liðið í nógv størri mun hevur verið ein av veruligu avbjóðarunum hjá StÍF.

### 3 – VÍF

Sigursvandu vestmenningarnir máttu taka til takkar við bronsukrónunum hesaferð, og tað er sjálvandi ikki nakað, sum teir eru vanir at sessast við. Og tá liðið heldur ikki megnaði at seta seg ígjøgnum í steypakappingini, gjørdist talan um eitt av heldur lakaru árunum hjá VÍF.

Fyri ein stóran part var endastøðan tó eitt úrslit av teimum missum, sum liðið var fyri í árinum. Longu eftir fyrsta dystin meiddi Sámal Joensen sær krossbandið, soleiðis at hansara leiklutur ikki gjørdist nakar serligur. Áki Olsen var skaddur stóran part av grundspælinum, og innanhýsis leikbannið, sum Piti Negru fekk eftir dystin móti Kyndli bøtti heldur ikki um í so máta.

### 4 – Neistin

Bláa havnarliðið tók øll á bóli í grundspælinum, har teir alla tíðina vóru við til at mynda oddin á stigatalvuni, hóast liðnum ikki varð spátt teir heilt stóru møguleikarnar undan kappingini. Í endaspælinum dovnaði spælið tó nógv. Liðið tóktist ikki á sama hátt at kunna kløkka mótstøðuliðini, og skjótt dalaði vónin um heiðursmerki.

Fyri framtíðina hevur Neistin tó tikið eitt stórt fet við liðnum í ár, og einki er at ivast í, at hetta er nakað, sum fer at koma felagnum til góðar komandi árini.

### 5 – KÍF

Aftur í ár var talan um eitt sera misjavnt ár hjá kollfirðingunum, sum helst áttu at fingið munandi meira burturúr, enn teir fingu. Tað tykist sum hevur onkursvegna uppalt ein eginleika, har møguleikin fyri stigum altíð verður tveittur fyri borð, tá mest stendur á, og fyrr enn kollfirðingarnir hava funnið leikaran, sum kann stýra liðnum í hesum avgerandi løtum, skulu teir neyvan rokna við at vinna seg longur upp eftir stigatalvuni.

### 6 – H71

Leingi var líkt til, at H71 var liðið, sum skuldi stríðast við Tjaldur um at sleppa av botnsessinum, men ein góður mánaður í endaspælinum broytti tó hetta. Hoyvíkingarnir gjørdu bart, tá teir knógvaðu oddaliðunum fleiri umfør á rað, men so steðgaði alt upp aftur.

Samanum tikið munnu hoyvíkingarnir tó vera so hampuliga væl nøgdir um árið. Við mest sum bara fólkum úr egnum røðum hevur liðið í øllum førum givið fleiri av sínum egnu drúgvari royndir, og við einum ella tveimum sterkum útlendskum leikarum er als ikki óhugsandi, at H71 aftur fer at ota seg móti tindunum.

### 7 – Tjaldur

Tað var alla tíðina botnsessurin, sum tóktist vera heimabeitið hjá Tjaldri. Fleiri ferðir hevði liðið annars gott tak á mótstøðuni, men orkan sveik aloftast seinastu minuttirnar, og spurningurin í løtuni tykist kanska vera, hvussu verður við framtíðini hjá felagnum í bestu deildini. Fleiri av teimum, sum í dag eru bulurin á liðnum, nærkast av álvara pensiónsladrinum í hondbóltshøpi, og eingir leikarar standa klárir at taka við ábyrgdini. Liðið fekk ársins toppskjútta í Dragisa Stojovic, men tað er lítið at ivast í, at hesin verður at síggja í øðrum felagi komandi árið.



B36-GÍ 5-1 (3-1)

# B36 fann stevið

**Trýstið var stórt á árstalsfelagnum undan dystinum, men teir lótu ongan iva vera um, at teir ætla sær víðari í steypakappingini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Eftir bert trý stig í trimum dystum vistu teir í B36, at nú mátti røkka ella støkka. Mótstøðuliðið var GÍ, og um talan ikki gjørdist um sigur, stóð liðið eftir við einum kravi um seks stig í teimum báðum seinastu dystunum, sum eru móti ávíkavist HB og Skála.

### Sannførandi

Nú er trýstið tó minkað nakað. B36 vann nevnliga ein sannførandi sigur á GÍ, sum valla fekk fótin á jørðina.

Longu eftir fimm minuttum var Allan Mørkøre upp á spæl, tá hann bæði byrjaði og endaði álopið, sum førdi til leiðslumálið, og so var tað fyri tað mesta einvegis.

Jákup á Borg økti við brotssparki, og stutt undan steðginum økti Julian Johnsson til 3-0. Gøtumenn minkaðu tó skjótt um munin, tá Krzystof Popczynski gjørdi sær dælt av misskiljing í B36-verjuni.

Hetta merkti tó ikki, at gestirnir fingu loyvi at koma í dystin. Ferðin hjá B36 minkaði kanska nakað eftir steðgin, men teir høvdu alla tíðina tamarhald á, og við tveimum málum frá John Petersen staðfestu teir sigurin. Tað fyrra við brotssparki, meðan tað seinna kom eftir gott einmansavrik.

Og nú bendir alt á, at tað verða tey trý, HB, B36 og GÍ, sum koma víðari úr bólkinum. Enn eru tó ikki allar súður syftar hjá B36, men trý stig í teimum báðum seinstu dystunum skuldu verið nóg mikið, og verður spælið, sum tað var leygardagin, er lítið at ivast í, at hesi verða fingin til høldar.

### Dysturin í tølum

**B36-GÍ 5-1 (3-1)**
1-0: Allan Mørkøre
2-0: Jákup á Borg
3-0: Julian Johnsson
3-1: Krzystof Popczynski
4-1: John Petersen
5-1: John Petersen

Neistin-Kyndil 23-31 (8-17):

# Kyndil best í Havn

**Silvurmerkini hjá Kyndli vóru veruleiki, tá teir vunnu trygt í seinastu grannuppgerðini, og hetta undirstrikaði sum so eisini góða endaspælið hjá liðnum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kyndil hevur av mongum verið mett sum besta liðið í endaspælinum, og úrslitini hjá teimum hava eisini í ávísan mun talað fyri hesum.

Seinasta uppgávan hjá liðnum var grannauppgerðin móti Neistanum, og tó at vónin um gullmerkini langt síðani er farin, so spældi Kyndil so ruddiliga fyri sínum møguleika um silvurmerki. Hesi kundu tryggjast, at Kyndil greiddi sín setning, samstundis sum StÍF gjørdist vinnarin í Vestmanna.

Og Kyndil greiddi sín setning. Serliga í fyrra hálvleiki var stórur munur á grannafeløgunum, og neistamálverjin mundi valla vita, hvønn veg hann skuldi snara sær, soleiðis sum skotini fóru fúkandi inn í meskarnar.

Við níggju mál stórari leiðslu í hálvleikinum, kundu teir grønu helst taka sær meira av løttum seinna umfarið, og heldur nýta orkuna til at fylgja við, hvussu gekst í Vestmanna.

Tað var tó um reppið, at teir tóku sær ov lætt hesa løtuna. Neistin royndi at stríða seg inn aftur í dystin, og sjey minuttir fyri leiklok var munurin komin niður í trý mál, men so var nokk. Kyndil setti ferðina eitt gear upp. Teir skoraðu seks tey seinastu málini í dystinum, soleiðis at sigurin kundi sementerast, og eftir hetta fóru teir so eftir silvurmerkjunum.

Og tó at silvurið er flott, sæð í mun til, hvussu liðið lá í grundspælinum, so skerst ikki burtur, at Kyndil í dag man hugsa um, hví so nógv varð mist tá. Flotta endaspælið og steypasigurin á nýggju føroyameistarunum bera tó boð um, at liðið nú aftur er til reiðar at trína á føroysku hondbóltstindarnar, og so er spurningurin bara, um hetta verður komandi ár, ella um teir grønu mugu bíða eitt sindur afturat.

### Dysturin í tølum

**Neistin-Kyndil 23-31 (8-17)**
Málskjúttar:
Neistin: Birgir Kass 7, Áki Mørk 6(1), Helgi Michelsen 4, Morgan Knezevic 2, Ragnar Stakksund 1, Kári Mortensen 1, Helgi K. Justinussen 1
Kyndil: Jacob Jónsson 7, Hans Áki Dal-Christiansen 7, Høgni Klein 6, Finnur Hansson 6, Ken Zachariasen 2, Rúni Mohr 1, Josef Abrahamsen 1, Janus Einar Sørensen 1
Brotskøst: Neistin 2, Kyndil 2
Útvísingar: Neistin 1, Kyndil 2
Dómarar úr TB/H71: Birgir Dimon & Jákup Símun Simonsen

# Trillitúrur

Skuldi onkur í Vestmanna sæð ein lukkuligan StÍF'ara trilla sær ein túr við barnavogni sunnumorgunin, skuldi ikki verið stórvegis ivi um, hvør hesin var.

Sveinbjørn Poulsen hevur í ár verið hjálparmaður á beinkinum hjá StÍF, men gerandisdagarnar er hann í Vestmanna hjá familju síni.

Og hann ivaðist ikki, tá vit spurdu han, um hann ætlaði sær ein gongutúr ígjøgnum bygdina sunnudagin.

- Ja, tað er so bumbusikkurt. Eg fari við barnavogninum, og eg ætli mær at ganga við akkurát hálvari ferð av tí, sum eg plagi, so eg kann vera vísur í hitta so nógv fólk sum gjørligt, segði hann við einum smíli.

**-jm**



## Endaligu støðurnar

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 12 | 11 - 1 - 0 | 630 | 502 | 128 | 32 |
| 2 | VÍF | 12 | 8 - 2 - 2 | 568 | 463 | 105 | 26 |
| 3 | StÍF | 12 | 6 - 1 - 5 | 567 | 582 | -15 | 19 |
| 4 | Stjørnan | 12 | 4 - 1 - 7 | 529 | 530 | -1 | 17 |
| 5 | Kyndil | 12 | 4 - 1 - 7 | 572 | 582 | -10 | 15 |
| 6 | Neistin | 12 | 5 - 0 - 7 | 493 | 535 | -42 | 15 |
| 7 | Tjaldur | 12 | 1 - 0 - 11 | 450 | 615 | -165 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 12 | 9 - 2 - 1 | 699 | 600 | 99 | 29 |
| 2 | Kyndil | 12 | 9 - 2 - 1 | 691 | 623 | 68 | 26 |
| 3 | VÍF | 12 | 8 - 0 - 4 | 744 | 636 | 108 | 25 |
| 4 | Neistin | 12 | 4 - 1 - 7 | 661 | 649 | 12 | 18 |
| 5 | KÍF | 12 | 3 - 2 - 7 | 642 | 681 | -39 | 13 |
| 6 | H71 | 12 | 5 - 0 - 7 | 625 | 702 | -77 | 13 |
| 7 | Tjaldur | 12 | 0 - 1 - 11 | 608 | 779 | -171 | 4 |

# Eitt løgið ár



*Komandi venjari hjá StÍF er Marian Cirloganescu, men fyri fyrst vildi hann bara sleppa at njóta heiðurin sum føroyameistari*

Mynd: Álvur Haraldsen

**Marian Cirloganescu helt eftir dystin, at kappingarárið hevði verið løgið, men endastøðuna fegnaðist hann sjálvandi um**

MEISTARI
*Jákup Mørk*

- Hetta hevur jú eisini verið eitt løgið ár. Vit hava til dømis vunnið allar dystirnar móti VÍF, men so hava vit tapt fyri Tjaldri, sum annars tapir fyri øllum øðrum, so hetta er løgið.

Marian Cirloganescu var mest sum í ørviti eftir dystin móti VÍF. Eftir eitt kappingarár, har flestu liðini hava leikt sera óstøðugt, men har strandingar við seinasta sigrinum sópaðu allan iva til viks.

Sjálvur var Marian eisini ein av týdningarmestu leikarunum hjá StÍF hendan dagin. Avrik hansara var veruliga í topp hendan dagin, og tá eru fáir málverjar í landinum, sum kununu sammetast við hann.

- Tað er ivaleyst tí, at eg trívist við hesum stóru dystunum. Tá setir tú teg eyka nógv upp, og tá eg so eisini fangi nakrar bóltar beinanvegin, riggar alt bara sum tað skal.

### Verður venjari

Um komandi kappingarárið viðgongur Marian annars, at tað helst verður so, at hann skal taka sær av venjingini

- Tað er so nýtt enn, so tað kann eg ikki siga so nógv um, men tað er helst rætt.

- Fyri fyrst skulu vit tó njóta hendan sigurin, men um eina viku ella so mugu vit longu byrja at hugsa um næsta ár. Vit skulu helst hava ein leikara inn fyri Costin, men í aðrar mátar vóni eg, at liðið verður tað sama, og so er bara at vóna, at leikararnir verða eins blíðir móti mær, sum teir hava verið mótvegis Costin. Eg ætli mær í øllum førum at gera mítt besta, sigur Marian Cirloganescu at enda.